SKYN

Nýtt

# Ikki bert ognir, men heim



## HOYVÍK

Sethús, Bertugøta 3

| m² | m² | | |
|---|---|---|---|
| 192 | 300 | 2 | 2008 |

Nýggj sethús í Hoyvík. Húsini eru í tveimum hæddum. Harafturat hoyrir bilhús á umleið 20 fermetrar til ognina. Í niðaru hæddini er durur, gongd, brúggers, baðirúm við brúsu, kamar, stova við peis, køkur og hjúnarrúm við egnum baðirúmi, sum hevur gosbað og tvær brúsur. Inn frá hjúnarrúminum er eisini stórt klædnarúm. Á loftinum er loftsstova og tvey kømur. Skipsparkett og flísar eru á gólvunum í niðaru hæddini. Úr stovuni er hurð út á stóra terassu, og úr brúggersinum er hurð út í bilhúsið. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi, og skúlar og dagstovnar eru nær við.

Prísuppskot: kr. 2.700.000








SENDISTOVAN

## TÓRSHAVN

Sethús, Villingardalsvegur 49



Nýtt

| m² | m² | | |
|---|---|---|---|
| 77 | 610 | 1 | 1950 |

Sethús í einari hædd: durur, gongd, køkur, stova, 3 kømur, baðirúm og hjallur. Húsini eru bygd í fimtiárunum, men bygt er uppí í fleiri umførum. Tak, vindeygu og klædningur vórðu skift í sjeyti- og áttatiárunum, og tá vórðu útveggirnir eisini bjálvaðir. Húsini standa í hugnaligum og friðarligum umhvørvi og hava nakað av útsýni.

Prísuppskot: kr. 1.300.000




## NORÐSKÁLA

Sethús, Norðskálavegur 44



| m² | m² | | |
|---|---|---|---|
| 280 | 750 | 2 | 2006 |

Nýggj, hugnalig hús í 2 tveimum hæddum. Harumframt er bilhús á 50 fermetrar. Í miðhæddini er durur, gongd, baðirúm, vaskirúm, køkur, stova, klædnarúm og 2 kømur. Í niðaru hæddini er kjallari. Køkurin er av merkinum Biga. Vindeyguni eru mahogny við orkusparandi termorútum. Garður er rundanum húsini. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi, og útsýnið er sera gott.

Prísuppskot: kr. 1.600.000


